# Deildarstjóri til Frímerkjadeildina




## Uppgávan

Vegna tað, at verandi leiðari fer frá fyri aldur, søkir Pf. Postverk Føroya eftir nýggjum deildarstjóra til Frímerkjadeildina.

Frímerkjadeildin er útflutningsfyritøka burturav við einum árligum umsetningi uppá 24 mió. kr. og um 30.000 viðskiftafólki kring allan heim. Á Frímerkjadeildini, ið veitir tænastur á 5 ymiskum málum, starvast um 35 fólk, ið fáast við alt frá hugskoti og sniðgeving til marknaðarføring, kundarøkt og pakking.

Nýggi deildarstjórin fær ábyrgdina av fíggjarliga úrslitinum á Frímerkjadeildini, og skal leggja til rættis frímerkja-útgávur, marknaðarføring og kundarøkt.

Umframt at geva út frímerki til nýtslu í føroyska postverkinum, er høvuðsuppgávan hjá Frímerkjadeildini at selja føroysk frímerki til savnarar uttanlands. Týðandi grein av uppgávuni er við frímerkjum og øðrum tilfari at vekja áhuga og kunnleika um Føroyar í altjóða høpi.

Internetið er týðningarmikið amboð í kunnandi virkseminum, og Frímerkjadeildin hevur í dag ikki færri enn 4 heimasíður. Ein er miðsavnandi portalur, meðan hinar eru evnislýsandi heimasíður, ið snúgva seg um føroyska mentan, náttúru, siðsøgu, list, bókmentur og jarðfrøði.

## Førleiki

Tú hevur hóskandi útbúgving og starvsroyndir, og kanst vísa á góð úrslit innan leiðslu og sølu. Framskygni er altavgerandi í starvinum, sum krevur neyva skipan av allari framleiðslu langt fram í tíðina.

Tú hevur greiða fatan av møguleikunum innan KT, serstakliga innan *direct marketing*, og hugflog til støðugt at menna internetið sum amboð í marknaðarføringini av føroyskum frímerkjum. Dentur verður lagdur á góð samskiftisevni, málkunnleika, leiðsluroyndir, og so dugir tú eisini væl at fáast við fólk.

## Pf. Postverk Føroya bjóðar tær

eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í altjóða umhvørvi við tíðarhóskandi leiðsluhátti. Vit bjóða tær góða løn, ið svarar til førleika og royndir.

Pf. Postverk Føroya

## Umsókn

Áhugað eru vælkomin
at ringja til
Sofus Clementsen stjóra
á tlf. 23 61 31
fyri at fyri at kunna seg
um starvið. Allar umsóknir
verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir við hóskandi
prógvum og viðmælum
skulu vera okkum í hendi
fyri 30. oktober 2006
og skulu sendast til:

Pf. Postverk Føroya
att: Sofus Clementsen
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

ella um teldupostin til :
postur@postur.fo

Postverk Føroya

Pf. Postverk Føroya · Óðinshædd 2 · FO-100 Tórshavn · Tlf: 34 60 00 · Fax: 34 60 01 · postur@postur.fo · www.postur.fo

# Sølu- og marknaðarstjóri




## Uppgávan

Pf. Postverk Føroya stendur á gáttini til eina nýggja, spennandi og avbjóðandi framtíð, nú stovnurin er um-skipaður til partafelag.

Pf. Postverk Føroya søkir í tí sambandi eftir sølu- og marknaðarstjóra, sum fær høvuðsuppgávuna at mynda og samskipa sølu felagsins úr enda í annan. Starvið sum sølu- og marknaðarstjóri er beinleiðis avleiðing av strategisku menningini, ið er sett í gongd á Pf. Postverki Føroya.

Nýggi sølu- og marknaðarstjórin fær stóra ávirkan á, hvussu sølu- og marknaðararbeiðið skal mennast, og fyrsta avbjóðingin verður at seta á stovn sølu- og marknaðardeild, har eisini vørumenning og branding hoyra til. Tú tekur virknan lut í stjórn felagsins og fært tískil beinleiðis ávirkan á tær framtíðarstrategiir, ið verða lagdar fyri fyritøkuna.

## Førleiki

Tú hevur drúgvar, hóskandi starvsroyndir, og tað er ein treyt, at tú kanst vísa á úrslit innan sølu og leiðslu. Títt eyðkenni er m.a., at tú røkkur tey mál, tú setur tær. Tú dugir væl at fáast við fólk, og hevur sostatt lætt við at skapa støðugt samband við viðskiftafólk og -stovnar.

Tú sært møguleikar heldur enn forðingar, samstundis sum tú ert før/ur fyri at arbeiða á ein bæði skapandi og ítøkiligan hátt. Umframt hóskandi útbúgving hevur tú kanska eisini royndir innan CRM, og hevur greiða fatan av møguleikunum innan KT.

## Pf. Postverk Føroya bjóðar tær

eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í umhvørvi við nýmótans leiðsluhátti. Talan er um eitt krevjandi starv, og tí bjóða vit tær eina góða løn, samsvarandi førleika og royndum.

Pf. Postverk Føroya

## Umsókn

Áhugað eru vælkomin
at ringja til
Sofus Clementsen stjóra
á tlf. 23 61 31
fyri at fáa meira at vita
um starvið. Allar umsóknir
verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir við hóskandi
prógvum og viðmælum
skulu vera okkum í hendi
fyri 16. oktober 2006
og skulu sendast til:

Pf. Postverk Føroya
att: Sofus Clementsen
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

ella um teldupostin til :
postur@postur.fo

Postverk Føroya

Pf. Postverk Føroya · Óðinshædd 2 · FO-100 Tórshavn · Tlf: 34 60 00 · Fax: 34 60 01 · postur@postur.fo · www.postur.fo